# Skrímsli í vanda

(Neyðars skrímsl)
Rithøvundar: Áslaug Jónsdóttir (IS), Kalle Güettler (SE) og Rakel Helmsdal (FO)
Myndir: Áslaug Jónsdóttir (IS)
Forlag: Mál og menning, 2017
Tilnevnd barna- og ungdómsbókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í 2018




ISBN 978-952-7490-06-8

Søgugongd: *Neyðars skrímsl* snýr seg um Stóra skrímsl, sum gleðir seg til at vera saman við vini sínum, Lítla skrímsli. Ávegis til vin sín hugsar Stóra skrímsl um alt tað stuttliga, tey skulu gera saman. Men Lodna skrímsl er hjá Lítla skrímsli. Tað vísir seg, at Lodna skrímsl ongantíð kann sleppa heim aftur. Hvat man vera hent?

Evni: At vera góður við onkran, at lurta eftir hvørjum øðrum, innliving, vinalag, at loysa trupulleikar, at vera uttanfyri, kenslur, flýggjan

## Samtalur og virksemi:

### HYGG OG LES við teimum yngstu

**Hygg at myndunum saman við barninum. Hvørjar áhugaverdar smálutir finna tit?**

### TEY YNGRU

**1. Hygg at myndini á kápumyndini. Hvat heldur tú, bókin snýr seg um?**

**2. Lýs tey ymisku skrímslini. Hvussu síggja tey út? Hvussu hava tey tað? Tekna títt egna skrímsl.**

**3. Hevur tú nakrantíð bløtt og fingið plástur á sárið? Hvat hendi?**

**4. Hvussu eita skrímslini, sum hjálpa við at byggja húsið?**

**5. Kennir tú tey ymisku amboðini, sum verða brúkt til at byggja húsið? Eiga tit tílík amboð heima?**

### MIÐLINGAR

**1. Ger títt egna skrímsl við saksi og pappíri. Hvussu eitur títt skrímsl, og hvørjar yndisleikur hevur tað?**

**2. Um tú skuldi bygt títt egna hús, hvussu skuldi tað sæð út? ? Lýs við orðum.**

**3. Hvussu heldur tú, at Lodna skrímsl kennir seg? Hví heldur tú tað? Dugir tú at finna trý orð, sum kunnu lýsa kenslurnar hjá skrímslinum?**

**4. Hvussu heldur tú, at Lodna skrímsl fer at hava tað í nýggja húsinum?**

**5. Ger søguna til leik í smáum bólkum.**

### TEY STØRRU BØRNIN

**1. Hvat dámdi tær við bókini? Hvat dámdi tær ikki? Var nakað, ið tóktist trupult? Kennir tú nakað aftur úr øðrum søgum?**

**2. Hygg at myndunum av  Lodna skrímsli. Hvat heldur tú er hent? Hvat hevði tú gjørt, um vinur tín kom og bað teg hjálpa sær?**

**3. Hví heldur tú, at Stóra skrímsl vil sleppa undan Lodna skrímsli? Hví heldur tú, at tað er truplari, at tríggir vinir spæla saman, heldur enn tá ið tveir vinir spæla saman?**

**4. Hví heldur tú, at Lodna skrímsl ikki vil siga, hvat er hent?**

**LES EISINI:**

*Det var ikke en busk* eftir Eli Hovdenak

## MÁLBITIN

# "Skrímsl"

| svenskt | danskt | norskt | íslendskt | føroyskt | grønlendskt | finskt | norðursamiskt |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Monster** | **Monster** | **Monster** | **Skrímsli** | **Skrímsl** | **Uumasorujussuaq** | **Hirviö** | **Borrin** |



Frámerkið myndir av tykkara lesiupplivingum við **#nordiskabokslukaren**!